# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# RÓSA FINGIÐ SINNINI Í KÓK

Tað er ikki sørt ódnarveður, sum landsstýriskvinnan í almannamálum er komin sær útí í sambandi við málið um íbúðir til sinnisveik, sum upprunaliga skuldi byggjast í Havn, men sum hon nú hevur flutt til heimbygd sína Sandavág.

Í heilt óvanliga hvassorðaum vendingum fordømir Sinnisbati ætlanina – ja, felagið ber hetta beinleiðis saman við at burturflyta sálarveik – og vísir á óvirðiligu støðuna, sum vit høvdu fyrr, tá hesin parturin av fólkinum varð fluttur av landinum.

Men tað er vorðin kotyma, at landsstýrisfólk skulu flyta virksemi úr høvuðsstaðnum og í sítt egna øki, so tann tankin, at Rósa Samuelsen vil skora politiskan vinning í sínum egna øki er av góðum grundum ikki so fjarur.

Men tað er als ikki veruleikin, sigur hon. Hon ger hetta, tí at Tórshavnar kommuna er so sein í vendingini, at tað fer at tarna ætlanini, um íbúðirnar skuldu byggjast í Havn. Hon hevur pengarnar tøkar, og teir fara fyri skeyti, um ætlanin verður útsett, tí Tórshavnar Kommuna hevur fingið tikið seg saman at svara byggiumsóknini. Sambært Heðini Mortensen, borgarstjóra, er als einki hald í hesum. Hann sigur, at bólturin liggur hjá Almannaráðnum, og at Tórshavnar Kommuna ikki hevur hoyrt frá Almannaráðnum síðani 29. juni.

Ikki er gott at vita, hvør av teimum hevur rætt. Jú víst kann Tórshavnar kommuna vera tung at dansa við, men eyðsæð er, at slík bygging á einum so stórum øki, krevur sína tilrættislegging. Og skuldi Almannaráðið ikki vitað tað?

Tá reaktiónirnar frá Sinnisbata eru so ógvusligar, so er tað vælsaktans eitt tekin um, at her er brúkarin als ikki samdur við ætlanini hjá landsstýriskvinnuni. Og hondina á hjartað, er tað ikki nettup í Havn, at slíkir stovnar skulu liggja, og er tað ikki nettup í fólkaríkasta økinum, at lættast er hjá at integrera hendan samfelagsbólkin?

– Niðurstøða okkara er, at tað



av fakligum, menniskjansligum, mentarligum og siðiligum orsøkum er váðaverk at tvangsflyta fólk til Sandavágs uttan at hoyra tey fyrst, sigur Sinnisbati, sum eisini brúkar so sterk orð sum skandala, ósømiligt og respektleyst. Slík skoðsmál landsstýriskvinnan at taka í størsta álvara og umhugsa málið enn einaferð. Sjálvur segði hon, at tað er »óheppið, at tað er í Sandavági, tá eg sjálv búgvi har«.

Hetta málið tykist ikki at vera væl fyrireikað, og neyðug og rímilig atlit tykjast heldur ikki at verða havd fremst í huga. Tí eigur landsstýriskvinnan at umhugsa hetta málið av nýggjum.

## Sinnisbati: Váðaverk at tvangsflyta fólk til Sandavágs

# MMR gloymdi blaðútgevarar og Rás

Føroysku bløðini og føroyska útvarpsstøðin Rás2 teljast ikki millum teirra, sum hava ávirkan á føroyska málið og føroyska stavseting. Í øllum førum ikki sambært Mentamálaráðnum, sum hevur boðað frá, hvussu tað ætlar at manna málráðið, sum skal gera av ivaspurningar um málburð og stavseting.



Føroysku bløðini geva út eini 70.000 bløð um vikuna, so eyðsæð er, at bløðini hava sína ávirkan – og sum ein so stórur mentanarberi, so er tað margháttligt, at einki umboð fyri bløðini ella Rás2 skal veljast í málráðið, sum skal hava limir, ið umboða Fróðskaparsetur Føroya, Føroyamálsdeildina, Føroya Lærarafelag, Føroya Pedagogfelag, Móðurmálslærarafelag Føroya, Málfelagið, Kringvarp Føroya, LISA, Javnstøðunevndina, Rithøvundafelagið, Føroysk Miðlafólk, Føroya Ungdómsráð, kommunufeløgini, Vitan og Mentamálaráðið.

Vit fáa okkum ikki at trúgva, at Mentamálaráðið hevur so lítið álit á privatu bløðunum. Felagið hjá okkara starvsgrein eitur Føroya Blaðútgevarafelag. Vit rokna sjálvandi við, at talan er um eina misskiljing frá Mentamálaráðnum, sum nú verður rættað.

# Jan Hardley á Torginum

Í sendingini »á Torginum« á Rás2 í annaðkvøld, týskvøldið, klokkan 21 verður Jan Hardley í Havn gestur hjá Svenningi á Lofti.



Jan Hardley er kendur handilsmaður í Havn, hann var giftur við Elsubu Hardley - betur kend sum Elsuba í Skotinum, sum doyði í fjør, og saman hava tey havt móthandil í eitt mannaminni.

Tað er Svenning av Lofti, sum er vertur í sendingini í annaðkvøld. Sendingin er hvørt týskvøld og hon verður endursend hvønn leygardag klokkan 12:30. Vertir eru upp á skift Kári Kjelnes, Absalon Absalonsen og Svenning av Lofti.



## Havnin onga orsøk til stúran

HELENA DAM Á NEYSTABØ
KJAK Á SÍÐU 29



## Fleiri tilboð til ungdómin

LEVI MØRK
KJAK Á SÍÐU 29

# Javnagudstænastur kring landið



*Javnagudstænastur verða kring landið, mikukvøldið klokkan 19:30 í Christianskirkjuni í Klaksvík*

Sum vant skipar Javni fyri gudstænastum kring landið uppundir jól.

Mikukvøldið 15. desember kl. 19.30 verður gudstænasta í OASUNI í Hoyvík.

Jóan Petur talar og dansibólkurin Saltið og kvinnukvintettin luttaka.

Klokkan 19:30 hetta kvøldið verður gudstænasta í Kristianskirkjuni í Klaksvík.

Hóskvøldið 16. desember verða tríggjar gudstænastur.

Klokkan 19 í Gøtu Kirkju við Gøtugjógv

Klokkan 19 í Frelsunarherinum í Vági, har barnakór syngur og framførir jólaleik.

Eftir gudstænasturnar verður boðið til ein drekkamunn, sigur Javni, sum heilsar, at øll eru hjartaliga vælkomin.

Sosialurin
Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*